## Umbering til Schwarzer

Egyptiski Essam Adb El Fatah bað í gjár um umbering fyri sína feilmeting av málinum, sum Japan skoraði móti Australia. Sjónvarpsmyndirnar vístu greitt, at talan var um fríspark móti australska málverjanum, Mark Schwartzer, tá hesin skuldi lofta einum innleggi frá Nakamura. Málverjin varð tó skumpaður, og bólturin sigldi spakuliga í netið til japanska leiðslu. Australia vann tó dystin við trimum málum móti dystarenda, men tað forðaði tó ikki dómaranum í at biðja Schwartzer um umbering eftir dystin.



## Togo-venjarin á veg útaftur

Mikið rok hevur verið í leguni hjá Togo í HM-undankappingini. Týski venjarin, Otto Pfister, rýmdi stutt undan fyrsta dystinum, men hann kom tó aftur, tá bæði spælarar og fótbóltssamband bønaðu hann um hetta. Hóast stuðulin, so eru røddirnar nú, at hann als ikki skal kenna seg vísan í sessinum.

Mikudagin gera vit av, um Pfister skal halda fram í sessinum. Sjálvur havi eg altíð verið ímóti, at hann fekk starvið, tí hann er ikki ein vinningur fyri liðið, sigur aðalskrivarin hjá fótbóltssambandinum í Togo.

**-mørk**



*Frustratiónirnar vóru sjónligar hjá fronsku stjørnunum, sum heldur ikki hesa ferð funnu málið. Her eru tað Thuram og Wiltord, sum fáa av at vita frá Zidane*

*Mynd: Scanpix*

# Hava ikki skorað síðani 1998

**Hóast teir av nógvum verða mettir millum sterkastu landslið í heiminum, so hevur Frakland ikki skorað í einum HM-endaspæli, síðani finaludystin í 1998**

HM BÓLKUR G
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tá Emmanuel Petit móti dystarenda sendi bóltin í kassan til 3-0, var hetta mest av øllum ein makt-demonstratión. Frakland var tá heimsins sterkasta fótbóltstjóð, og við at vinna EM tvey ár seinni, gjørdist landið hitt einasta, ið sum heimsmeistari hevur vunnið EM-heitið í fótbólti.

Men síðani hevur gingið skeiva vegin fyri tað mesta. Í HM-endaspælinum fyri fýra árum síðani reyk Frakland út, uttan at liðið somikið sum hevði skorað. Í EM fyri tveimum árum síðani eydnaðist hóast alt at koma víðari úr bólkaspælinum, men verjukenda grikska liðið – sum seinni vann EM-heitið – var ov sterkt í fjórðingsfinalunum.

Og í gjár var greitt, at tað heldur ikki eydnaðist Frak-landi at basa Sveis, sum í veruleikanum var nærri sigrinum, enn Frakland var tað. Eina frísparksroynd høvdu sveisarar á stólpan, og í seinna hálvleiki høvdu teir onkrar heilt góðar møgu-leikar, sum góvu Fabian Barthez meira enn bara smá-vegis trupulleikar.

Í hinum endanum hevði Henry ein góðan møguleika fyri steðgin, men ta ferðina lá sendingin til hansara tó ov aftarliga. Í aðrar mátar var ógvuliga avmarkað, hvat Frakland megnaði at skapa. Bólturin gekk nógv um Zinedine Zidane, men hóast einstakar detaljur, so var ov sjáldan, at spælið frá hansara fótum gjørdist nóg hvast.

Enn eru tó tveir dystir eftir av bólkaspælinum, og við dystum móti Suður Korea og Togo eigur Frakland at hava sínar møguleikar at skora. Men tað er einki at ivast í, at trýstið á Raymond Domenech og hansara menn skjótt er um at gerast heilt stórt.

### Togo leyp hvøkk á

Í fyrsta dystinum í gjár loypti Togo av álvara hvøkk á Suður Korea. Togo verður av flestu serfrøðingum mett sum avgjørt veikasta landið í endaspælinum, og ófriðurin kring venjarasessin mundi ikki gera fyrireikingarnar betri í so máta.

Lítla undirtippaða landið fekk tó sítt fyrsta mál, tá teir skoraðu einastu ferðina fyri steðgin, og eina løtu vóru Suður Koreanarar veruliga skelkaðir. Tað eydnaðist tó at koma á talvuna eftir steðgin, og við tveimum málum syrgdu teir fyri, at sleppa undan ring-astu atfinningunum. Men nakrar ábendingar um eina endurtøku av hálvfinaluplássinum fyri fýra árum síðani, fingu vit tó ikki hesaferð.

## HM-úrslit

Bólkur F
Brasil-Kroatia 1-0 (1-0)
1-0: Kaká, 44.

Bólkur G
Suður Korea-Togo 2-1 (0-1)
0-1: Kader Mohamed, 31.
1-1: Chun-Soo Lee, 54.
2-1: Jung-Hwan Ahn, 72.

Frakland-Sveis 0-0

Komandi dystir
Bólkur F

| Dagur | Kl. | Dystur |
|---|---|---|
| Bólkur H | | |
| 14.06 | 14.00 | Spania-Ukraina |
| 14.06 | 17.00 | Tunis-Saudi Arabia |
| Bólkur A | | |
| 14.06 | 20.00 | Týskland-Póland |
| 15.06 | 14.00 | Ecuador-Costa Rica |
| Bólkur B | | |
| 15.06 | 17.00 | Ongland-Trinidad & Tobago |
| 15.06 | 20.00 | Svøríki-Paraguay |

**HM-endaspælið**

**Bólkur A**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Týskland | 1 | 1 | - | 0 | - | 0 | 4 | 2 | 2 | 3 |
| 2 Ecuador | 1 | 1 | - | 0 | - | 0 | 2 | 0 | 2 | 3 |
| 3 Costa Rica | 1 | 0 | - | 0 | - | 1 | 2 | 4 | -2 | 0 |
| 4 Póland | 1 | 0 | - | 0 | - | 1 | 0 | 2 | -2 | 0 |

**Bólkur B**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Ongland | 1 | 1 | - | 0 | - | 0 | 1 | 0 | 1 | 3 |
| 2 Svøríki | 1 | 0 | - | 1 | - | 0 | 0 | 0 | 0 | 1 |
| 3 Trinidad & Tobago | 1 | 0 | - | 1 | - | 0 | 0 | 0 | 0 | 1 |
| 4 Paraguay | 1 | 0 | - | 0 | - | 1 | 0 | 1 | -1 | 0 |

**Bólkur C**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Argentina | 1 | 1 | - | 0 | - | 0 | 2 | 1 | 1 | 3 |
| 2 Holland | 1 | 1 | - | 0 | - | 0 | 1 | 0 | 1 | 3 |
| 3 Fílabeinsstrondin | 1 | 0 | - | 0 | - | 1 | 1 | 2 | -1 | 0 |
| 4 Serbia & Montenegr | 1 | 0 | - | 0 | - | 1 | 0 | 1 | -1 | 0 |

**Bólkur D**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Mexico | 1 | 1 | - | 0 | - | 0 | 3 | 1 | 2 | 3 |
| 2 Portugal | 1 | 1 | - | 0 | - | 0 | 1 | 0 | 1 | 3 |
| 3 Angola | 1 | 0 | - | 0 | - | 1 | 0 | 1 | -1 | 0 |
| 4 Iran | 1 | 0 | - | 0 | - | 1 | 1 | 3 | -2 | 0 |

**Bólkur E**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Kekkia | 1 | 1 | - | 0 | - | 0 | 3 | 0 | 3 | 3 |
| 2 Italia | 1 | 1 | - | 0 | - | 0 | 2 | 0 | 2 | 3 |
| 3 Ghana | 1 | 0 | - | 0 | - | 1 | 0 | 2 | -2 | 0 |
| 4 USA | 1 | 0 | - | 0 | - | 1 | 0 | 3 | -3 | 0 |

**Bólkur F**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Australia | 1 | 1 | - | 0 | - | 0 | 3 | 1 | 2 | 3 |
| 2 Brasil | 1 | 1 | - | 0 | - | 0 | 1 | 0 | 1 | 3 |
| 3 Kroatia | 1 | 0 | - | 0 | - | 1 | 0 | 1 | -1 | 0 |
| 4 Japan | 1 | 0 | - | 0 | - | 1 | 1 | 3 | -2 | 0 |

**Bólkur G**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Suður Korea | 1 | 1 | - | 0 | - | 0 | 2 | 1 | 1 | 3 |
| 2 Frakland | 1 | 0 | - | 1 | - | 0 | 0 | 0 | 0 | 1 |
| 3 Sveis | 1 | 0 | - | 1 | - | 0 | 0 | 0 | 0 | 1 |
| 4 Togo | 1 | 0 | - | 0 | - | 1 | 1 | 2 | -1 | 0 |

**Bólkur H**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Saudi Arabia | 0 | 0 | - | 0 | - | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 2 Spania | 0 | 0 | - | 0 | - | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 3 Tunis | 0 | 0 | - | 0 | - | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 4 Ukraina | 0 | 0 | - | 0 | - | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |